**Soleiðis brúkar tú hagtalsgrunnin**

Tá tú hevur valt teg inn á hagtalsgrunnin, er til vinstru eitt evnisyvirlit. Vel eitt evni t.d. ”Íbúgvaviðurskifti og val”. Til høgru fyri evnislistan koma nú fram talvurnar, sum eru undir evninum, tú hevur valt.

- Vel nú t.d. talvuna ”Fólkatalið 1. januar skift á býir/bygdir, ár og kyn” og fram kemur myndin sum sæst niðanfyri (tó uttan tær frágreiðingar, vit hava sett á her). Á næstu síðu byrjar eitt dømi, sum vísir, hvussu tú brúkar hagtalsgrunnin.



## Dømi um hvussu tú gert eina talvu

- Vel:
  1. í fyrsta geira við at peika við músini á valmøguleikan "Viðareiði", og trýst á vinstra músaknapp.
  2. í næsta geira við at peika við músini á valmøguleikan 1987, trýst á vinstra músaknapp og toga músina niðureftir, meðan tú heldur músaknappin niðri til tú hevur valt 1987, 1988 og 1989.
  3. í triðja geira trýst á ☑, sum er ovast í kassanum, fyri at velja øll evnini.
  4. Trýst so á [Halt áfram] sum er niðast.




- Fram kemur talvan, tú hevur valt.

Velja greiningar av nýggjum




**Fólkatalið 1. januar skift á býir/bygdir, ár og kyn**

| | 1987 | | | 1988 | | | 1989 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Mannfólk | Konufólk | Tilsamans | Mannfólk | Konufólk | Tilsamans | Mannfólk | Konufólk | Tilsamans |
| Viðareiði | 156 | 139 | 295 | 158 | 141 | 299 | 158 | 143 | 301 |

- Er talvan nøktandi kanst tú goyma hana í t.d. Excel, sí vegleiðing á síðu 5.

- Vilt tú afturímóti broyta talvuna, bakkar tú aftur til valmøguleikarnar við at trýst á Velja greiningar av nýggjum

## Broyt talvuna við bólkingarmøguleikum

- Nú fara vit at hyggja møguleikunum, íð eru at bólka.

- Tá møguleiki er at bólka, er ovast í greiningarlistanum ein vallisti við bólkingarmøguleikunum. Trýst á t.d. ”Kommunur 1. jan. 2005”.




- Nú eru ”býir/bygdir” skift út við ”Kommunur 1. jan 2005”.
  1. Halt við vinstra músaknappi á liftina, sum er til høgru í fyrsta greiningarlista, og toga niður til tú sært Sandavágs, Miðvágs, Sørvágs, Skopunar og Sands. Peika á ”Sandavágs” við músini og trýstur á vinstra músaknapp, halt á Ctrl-knappin meðan tú velur kommunurnar Sørvágs, Skopunar og Sands við at trýsta á vinstra músaknapp.
  2. Halt við vinstra músaknappi á liftina, sum er til høgru í næsta greiningarlista, og toga niður til tú sært árini 2000, 2001, 2002, 2003 og 2004. Peika við músini á valmøguleikan 2000, trýst á vinstra músaknapp og toga músina niðureftir, meðan tú heldur músaknappinum niðri til tú hevur valt niður til 2004.
  3. Í triðja greiningarlista peikar tú við músini á valmøguleikan ”Tilsamans” og trýst á vinstra músaknapp. Nú sær myndin soleiðis út.




4. Trýst so á Halt áfram

## Ger talvuna til graf

- Nú hevur tú fingið talvuna fram, og vit fara at gera graf úr talvuni. Tá tú gert grafar í hesum forritinum, er best at lata árstølini standa í eini teigi. I vallistanum "Broyt og rokna:" velur tú "Snúgva við sólini"




- Nú hevur tú fingið talvuna fram á skermin har talvan er vend. Í vallistanum "Vel grafar og landakort:" velur tú nú "Grafar".




| Fólkatalið 1. januar skift á ár, Kommunur 1. jan. 2005 og kyn | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | Sandavágs | Sørvágs | Skopunar | Sands |
| | Tilsamans | Tilsamans | Tilsamans | Tilsamans |
| 2000 | 689 | 973 | 489 | 557 |
| 2001 | 676 | 993 | 493 | 554 |
| 2002 | 689 | 1.039 | 481 | 602 |
| 2003 | 722 | 1.059 | 498 | 573 |
| 2004 | 730 | 1.085 | 495 | 591 |

- Fram kemur:




- Vilt tú heldur hava t.d. eina strikumynd, trýstur tú bara á  sum er ovast á glugganum. Vilt tú goyma grafin gert tú tað á vanligan hátt umvegis "File/Filer" og "Save as/gem som". Lat gluggan aftur á vanligan hátt umvegis "File/Filer" og "Close /Luk".

**Goym í Excel**

- Vilt tú goyma talvuna í Excel, letur tú upp vallistan ”Goym talvu sum:” og velur ”Excel-fílu (*.xls)”.




- Fram kemur:




- Her hevur tú 2 møguleikar:
  1. Velur tú at trýsta á ”Heinta fílu” við vinstra músaknappi kemur talvan fram í excel líki. Hiðani kunnu upplýsingar síðani lættliga heintast yvir í t.d. Excel umvegis ”Cut/Klippe” og ” Paste/klistre”.
  2. Halt við músuni á ”Heinta fílu” og trýst á høgra músaknappi vel ”Save target as…” /”Gem destination som …” og goym á t.d. skriviborðinum.

- Fyri at koma aftur til evnisyvirlitið trýst á > Hagtalsgrunnur > í slóðini, sum er ovast á tí hvíta partinum á skermmyndini




Góða ferð víðari í grunninum!